

## Fullar frystigoymslur

Íslendingar hava so ilt við at sleppa av við sínar fiskavørur, at nú eru allar frystigoymslurnar hjá fiskavirkjunum og flutningsfyritøkunum fullar. Eisini hjá reiðarínum Samskip eru goymslurnar fullar, og nógvur íslendskur fiskur er koyrdur á goymslu uttanlands, skrivar Morgunblaðið. Arnar Sigurmundsson, sum er formaður í felagnum hjá íslendsku fiskavirkjunum, sigur við blaðið, at um hesa tíðina plagar tað at ganga væl at sleppa av við fisk, men soleiðis er ikki í ár. Hann heldur, at umleið 8.000 tons eru í frystigoymslum í Íslandi.

# Vit vildu royna nakað nýtt



**Og tað gjørdist til fyritøkuna Synergi, sum bjóðar fram skeið av øllum handaslag. Summi eru umbiðin, meðan Synergi bjóðar onnur fram sum fólk, fyritøkur ella stovnar kunnu tekna seg til**

SKEIÐVIRKSEMI

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað eru nú fimm ár síðani at systrarnar Ása og Annika Andreasen stovnaðu skeiðsfyritøkuna Synergi.

- Vit tosaðu í fleiri ár um at fara at royna okkurt annað enn tað, vit gjørdu, eisini áðrenn man blívur for gamal, siga systrarnar, sum so tóku seg saman og stovnaðu Synergi 11. november 2003.

Tá starvaðist Ása á starvsfólkadeildini hjá Føroya Tele, men er annars útbúgvin pedagog og hevur starvast niðri í Danmark.

Annika var framman undan í ferðavinnuni, har hon starvaðist fimm ár á Flogfelagnum og 11 ár hjá Smyril Line.

Men tað var meira starvið hjá Ásu, sum kveikti hugin til at skipa fyri skeiðum.

- Vit vóru tvey, sum røktu starvið sum starvsfólkaleiðari sum eitt team. Tá skipaðu vit fyri einari ráðstevnu um kvinnur sum leiðarar, og tað gav mær blóð á tonnina, tí tað er ógvuliga spennandi at sipa fyri, sigur Ása Andreasen.

Tá vóru tær báðar systrarnar byrjaðar at tosa um at royna okkurt annað, og so endaði tað altso við, at Synergi varð sett á stovn.

Í meðan hevur Annika og maðurin búð eitt ár niðri í Spanien, men tað vísti seg ikki at órógva arbeiðið so ógvuliga nógv.

- Sjálvandi kundi eg ikki vera fysiskt til staðar til fundir og annað. Tað kundi bara vera talan um telefonfundir, og tað er jú ikki júst tað sama. Men tað gekk so tað árið, vit búðu har niðri, tó eg rokni ikki við, at Ása hevði verið áhugað í, at eg varð búgvandi har, sigur Annika Andreasen.

Eisini ferðaðist hon nakrar ferðir til Føroya hetta árið, tey búðu í Spanien, eitt nú tá tey skipaðu fyri hátíðarhaldinum hjá Føroya Banka.

### Hækka vitanarstøðið

Men hvat er Synergi so fyri ein fyritøka.

- Vit skipa fyri fakligum skeiðum og ráðstevnum, tað er tað primera. Men so skipa vit eisini fyri messum av ymsum slag, sum til dømis Lívsstílsstevnuna, sum vit hava skipað fyri tvær ferðir. So eru tað fyritøkur og stovnar, sum heita á okkum um at skipa fyri ráðstevnum og øðrum, eitt nú Føroya Banki ella Ráðið fyri Ferðslutrygd. Stovnar, sum ikki reiðiloiga makta at skipa fyri slíkum ráðstevnum sjálvi, tí tað er ógvuliga tíðarkrevjandi, sigur Annika Andreasen.

- Tað krevur nógv meiri enn fólk kanska hugsa sær. Og so hava vit tann fyrimunin, at vit kanska kunnu fáa gjørt tingini skjótari, tí vit hava royndirnar at hugsa um smálutirnir, sigur Ása Andreasen.

- Meiningin við Synergi er sjálvandi at útvega okkum eitt livibreyð og royna okkum sjálvar, men annars er meiningin, at vit fegnar vilja geva føroyska samfelagnum ein íblástur og meirvitan, soleiðis at vit fáa eitt betri samfelag og betri fyritøkur og stovnar, og harvið glaðari starvsfólk. Tað skal vera stuttligari og betri at vera her hjá okkum øllum, sigur Ása Andreasen.

Stutt sagt er ætlanin at hækka vitanarstøðið innan allar fakbólkar.

- Tá Synergi bleiv stovnað fanst onkur, sum skipaði fyri skeiðum, men ikki so støðugt. Afturmeldingarnar siga, at fólk eru glað fyri, at tað nú finst eitt støðugt útboð av skeiðum, og at tað ikki er neyðugt at fara til Danmarkar á skeið, sigur Annika Andreasen.

### Góða byrjan

Tað eru sjálvandi ikki øll skeið, sum Synergi kann skipa fyri, men tað góða er, at tað nú finst eitt støðugt útboð, tí fólk treingja til nýggjan íblástur av og til.

- Nógv av skeiðunum eru okkara egnu hugskot, og vit royna eisini at fylgja við hvat rørir seg á marknaðinum innan allar fakbólkar. Men vit fáa eisini hugskot frá øðrum, og tá tað hendir, kanna vit tørvin, og vísir tað seg, at tørvurin er har, seta vit skeiðið til sølu. Verður skeiðið so nóg nógv teknað og gjøgnumført, so sleppur tann, sum kom við hugskotinum, við fyri einki, sigur Annika Andreasen.

Og tað eru nógv, sum eru sloppin við á skeið ókeypis á tann hátt, leggja systrarnar aftrat.

Annars halda tær ikki, at tað var so tungt at koma í gongd. Fólk tóktust at taka væl ímóti teimum.

- Eitt tað fyrsta vit fóru undir, var eitt skeið har vit savnaðu miðlafólk í Føroyum. Tey flestu roknaðu við, at vit fóru at savna eini 30-40 fólk, men har vóru faktisk yvir hundrað, sigur Annika Andreasen.

Tað var eitt rættiliga gott startskot fyri Synergi, og tær báðar systrarnar lata væl at gongdini síðani.

- Vit hava avlýst nøkur heilt fá skeið síðani vit byrjaðu, men tey kunnu teljast á einari hond, kanska 3-4, sigur Ása Andreasen.

Onkur av hesum avlýsingum kann hanga saman við, at tíðin stutt sagt ikki er búgvin, og tey kunnu kanska verða fult teknað, verða tey boðin út seinni, tí øll rák koma ikki eins skjótt til Føroya.

### Gera forarbeiði

Tiltøkini, sum Synergi hevur skipað fyri, eru í støðugari menning.

- Hyggja vit at, tá vit byrjaðu, og sammeta við nú, so hava vit munandi fleiri lut-